**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Fulltrúi í Mentamálastýrinum

**Starvið:**
Í Fólkaskúladeildini er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi leyst at søkja.

Mentamálastýrið er skipað í 3 deildir: Fólkaskúladeild, Vinnu- og Miðnámsskúladeild og Mentamáladeild.

Í Fólkaskúladeildini starvast tveir undirvísingarleiðarar, og tann, sum settur verður, kemur at arbeiða í tøttum samstarvi við hesar báðar og við stápsfunktiónirnar í stýrinum.

**Vit søkja eftir einum fulltrúa, sum:**
- hevur hug at arbeiða í einum toymi í Fólkaskúladeildini
- hevur áhuga fyri og kunnleika til skúlaøkið
- hevur áhuga í at arbeiða við tølum, greiningum, hagtølum v.m.
- hevur innlit í vanlig telduforrit, dugir at arbeiða við rokniarkum, databasum o.s.fr.

**Høvuðsuppgávurnar verða at:**
- gera fyrisitingarligar leiðreglur
- gera búskaparligar myndlar
- umsita sáttmálaviðurskifti
- útvega hagtøl

**Harumframt skal viðkomandi eisini taka sær av at fyrisita:**
- Læraraeftirlønir
- Húsarhaldsskúlan
- Føroya Fólkaháskúla
- Privatskúlar
- Eftirskúlar
- Frískúlar

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjararnir hava
- Viðkomandi útbúgving frá lærdum háskúla, útbúgving á líknandi stigi ella læraraútbúgving við viðkomandi eftirútbúgving
- Vilja og evni til at royna nýggjar leiðir
- Áhuga fyri avbjóðingum

Umsøkjarar við fyrisitingarligum royndum hava fyrimun.

**Vit bjóða:**
- eitt sjálvstøðugt starv í einum mennandi umhvørvi
- eitt gott umhvørvi
- eina deild við virknum starvsfólki.

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvsuppgávunum.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fatar um aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø skulu sendast til:

**Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegi 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 6. mai 2002. Starvið verður sett frá 1. juni 2002 ella eftir nærri avtalu.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Olaus Jespersen, deildarstjóra í Fólkaskúladeildini, tlf. 35 50 50.

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Øki hjá Vinnu- og Miðnámsskúladeildini** umfatar studentaskúlarnar, HF-skeiðini, handilsskúlarnir, teknisku skúlarnir, Fiskivinnuskúlan, sjómansskúlarnir, Maskinmeistaraskúlan og lærlingaútbúgvingar.*


## Í FELAGSSKAPI SUM JAVNSETT LOND

REPROZ · 319540



Soffi Egholm, Leynar — Rúni Lisberg, Sumba — Bergur Dam, Tórshavn — Jákup á Fløti Jacobsen, Klaksvík

JAVNAÐARFLOKKURIN


Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

# Summarhús til sølu

**í norðursælandi nær við Liseleje**



Húsini eru 63 m² til støddar og eru sera væl innrættaði. Stór stova, stórur køkur, tvey kømur við dupult song, eitt gestakamar og baðirúm. Reiðskapsskúrur við øllum.

Húsið verður selt fult møbelerað, t.d. vaskimaksina. Garðurin er sera snotisligur og heilar 1206 m².

Fíggingin er sera lagalig.

Prísur: **kr. 495.000,–**

***Nærri fæst at vita á***
**tlf. (+45) 20858627 Kaj / 2211828 Jens**

# Trøð og sethús í Tórshavn til sølu

Ognin – matr. nr. 1216a – við Marknagilsvegin verður seld, um hóskandi boð fæst.

Ognin er 9.495 m² til víddar við ástandandi sethúsum, sum eru umleið 130 m² í grundvídd í 2 hæddum.

Ognin liggur sera væl fyri og hevur avbera gott útsýni yvir Havnina og Nólsoyarfjørð.

Áhugað kunnu ringja ella støkka inn á gólvið hjá Húsamekling, her kunnu vit greiða nærri frá um ognina.

**Húsamekling**
**Sp/f Protek, Vaglið, Postsmoga 331,**
**110 Tórshavn,**
**Tlf. 319321, Fax 319331,**
**E-mail: protek@post.olivant.fo**
**www.husamekling.fo**
**Avgreiðsla kl. 9-12 og 13-16**

# Sethús í Hvalba til sølu

Við hesum verður matr. nr. 121 í Hvalba lýst til sølu.

Talan er um grundøki, vídd 843 m², við ástandandi eldri sethúsum og úthúsum.

Húsini kunnu síggjast eftir nærri avtalu.

**Suðuroyar Sparikassi**
900 Vágur
tlf. 373064

**Gøtu Kommuna**

# Kunngerð

Samb. kunngerð nr. 23, 18. mars 2002
fer løgtingsval fram

**týsdagin tann 30. apríl 2002**
**í samkomuhøll skúlans við Gøtugjógv.**

**Atkvøðugreiðslan**
byrjar kl. 10.00 og heldur fram til kl. 20.00 ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til fólkayvirlitið/kommunuskrivstovuna. Brævatkvøður skulu verða valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 30. apríl 2002.

**Heimaval**
Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri valið við at boða frá til kommunuskrivstovuna – helst innan kl. 16.00 mánadagin tann 29. apríl 2002.

**Valkort**
Vart verður gjørt við, at valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða send út við postinum til allar løgtingsveljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, ið heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

***Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val***

18. apríl 2002
**Valstýrið í Gøtu**
Måns Persson, formaður

# Bókavørður

Á Fuglafjarðar Bókasavni er eitt starv sum bókavørður leyst at søkja til ***1. august 2002***.

Tann, ið sett/ur verður, skal arbeiða við øllum vanligum bókavarðaarbeiði í tøttum samstarvi við Kunningarstovuna í Fuglafirði, sum heldur til í somu húsum, sum bókasavnið.

Til starvið krevst útbúgving sum bókavørður.

Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Umsóknir saman við próvskjølum verða at senda Fuglafjarðar býrráð, Postsmoga 30, 530 Fuglafjørður í seinasta lagi ***14. juni 2002 kl. 15.00***.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fyrsta árið verður at rokna sum royndarár.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á tlf. 444006.

Fuglafjørður, tann 15. apríl 2002.
**Fuglafjarðar býráð**

**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Lønar- og starvsfólkadeildin*

# Fulltrúi til Almanna- og heilsumálastýrið

**Starvið:**
Eitt starv sum fulltrúi á Almannadeildini verður leyst til setan í Almanna- og heilsumálastýrinum sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Høvuðsuppgávur hjá fulltrúanum eru at:
- ráðgeva aðalstjóra og deildarstjórum,
- gera uppskot til lógir og kunngerðir
- málsviðgerð

**Førleiki:**
Vit hugsa okkum at tú hevur, ella fær í næstum, útbúgving frá hægri lærustovni, eitt nú cand.jur., cand.polit., cand.scient.pol., cand.scient.adm. ella líknandi, og hevur góðan kunnleika til mál og til edv.
Umsøkjarar uttan hægri útbúgving, men við hollum royndum innan almenna umsiting, hava eisini møguleika at søkja.
Ynskiligt er at tú hevur vitan/royndir innan almannapolitikk.
Harumframt at tú hevur góð samstarvsevni og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit bjóða:**
- Starv, sum til tíðir er strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við skiftandi uppgávum.
- Flex tíð
- Sjálvstøðugt starv
- Skeiðmøguleikar

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal at setanin umfatar Almanna- og heilsumálastýrið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
***Lønar- og starvsfólkadeildin***
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreist: 6. mai 2002 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.

*Almanna- og heilsumálastýrið hevur um hendi málsøkini: Almannamál, heilsumál, apoteksmál, íbúðarmál og ávís arbeiðsmarknaðarmál, harundir m.a. javnstøðumál.*
*Í Almanna- og heilsumálastýrinum starvast í løtuni 9 fulltrúar. Aðalstýrið er skipað í 4 eindir: aðalskrivstovu, almannadeild, heilsudeild og lønar- og starvsfólkadeild.*

# Kunngerð

Atkvøðugreiðslan í Vágs kommunu á løgtingsvalinum onsdagin 30. apríl 2002 verður í samkomuhøll skúlans.

Atkvøtt verður frá

**kl. 10.00 til kl. 20.00**
ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið samært vallógini lúka treytirnar fyri at nýta brævatkvøðu, kunnu atkvøða á býráðsskrivstovuni til og við mánadagin 29. apríl 2002.

Tey, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima til og við dagin fyri valið, men má verða boðað frá til býráðsskrivstovuna til. 373024 ella tlf. 373315 í seinasta lagið mánadagin 29. apríl 2002 kl. 15.00.

Gjørt verður kunnugt, at valkort verða send øllum veljarum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til býráðsskrivstovuna sum skjótast.

17. apríl 2002
**Valstýrið í Vági**


MALAN HELGADÓTTIR
Miðvágur




JAVNAÐARFLOKKURIN


Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo